# Ein garvaður og ein nýggjur

**Bartal Eliasen úr ÍF og Harriet Hammer úr TB vórðu kosin besti verjuleikari**

*Sveinur Tróndarson*



*Bartal Eliasen úr ÍF varð kosin til besta verjuleikara hjá monnum hetta kappingarárið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í kappingini hjá monnum fór Bartal avstað við steypinum fyri nøsini á Joen Petur á Stongum úr SÍ og Jan Hentze úr Fleyr.

Neyvan nakar, sum hevur sæð flogbólt í ár, er í iva um, at Bartal er ein fram úr góður flogbóltsleikari, og tí kann tað heldur ikki koma óvart á, at hann verður kosin at vera besti verjuleikari.

Styrkin hjá Bartali er ikki bara í verjupartinum, men tað er har hann bestur. Hann hevur góðar móttøkur og er einastandandi skjótur á gólvinum. Tí er valið rættvíst.

Stuttligt er annars at síggja, at Joen Petur á Stongum úr SÍ, sum bara er 16 ára gamal, hevur snikt seg inn millum tveir garvaðar leikarar. Joen Petur hevur í ár víst, at føroyskur flogbóltur eigur gott at byggja á, og stuttligt er at síggja, at hinir leikararnir longu virðismeta hansara avrik á vøllinum.

Triði maðurin, Jan Hentze, hevur í fleiri ár, verið ein knassi á vøllinum, og tí er hann eisini eitt gott boð.

Hjá kvinnum var tað Føroyameistarin, Harriet Hammer úr TB, sum fór við heiðrinum. Eisini hetta er eitt gott væl, tí Harriet hevur verið ein dyggur stuðul á Føroyameistaraliðnum. Hon ger ikki so nógv um seg sum onkrir aðrir leikarar, men hon er trygg í móttøkunum og arbeiðir sera væl í verjuni.

Tað gera Vera Larsen og Randi Larsen eisini, men hinir leikararnir hava hildið avrikið hjá Harriet verið størri og tað er bæði rætt og rímuligt. Hjá monnum var tað stuttligt, at ein av teimum ungu snikti seg upp í millum. Hjá kvinnunum var tað kanska uppaftur stuttligari, tí her fór hon við heiðrinum.

# Útlendingarnir myndaðu best álopið

**Marina Popovic úr Drátti og Boban Ilic úr ÍF kunnu næsta árið kalla seg bestu áleypararnar í føroyskum flogbólti**

*Sveinur Tróndarson*

Kappingin hjá kvinnum stóð serliga millum tær tríggjar, Marinu úr Drátti, Tinu Jacobsen úr Mjølnir og Gudrid Nolsø úr TB.

Lítið er at ivast í, at fleiri høvdu væntað, at Gudrid Nolsø fór at fáa heiðurin, eftir at hon bæði gjørdist gullvinnari á Man við landsliðnum, Danmarksmeistari fyri U-21 leikarar við Fortuna og Føroyameistari við TB.

Men Gudrid hevur bara leikt umleið helmingin av føroysku kappingini og tað hevur helst havt sína ávirkan.

At valið fall á Marinu Popovic er bæði rætt og rímuligt. Hon hevur víst seg at vera ein fram úr góður leikari og ein fongur fyri Drátt. Hon hevur eitt gott slag og dugir eisini sera væl at lesa blokkin av.

Í fjør gjørdist Marina meistari saman við Drátti, men í ár máttu tær taka til takkar við bronsuni. Tað er í sær sjálvum ikki nøktandi, men tað vísir kortini, at kappingin millum liðini er so mikið hørð, at tú skalt hava eitt gott lið fyri at gerast meistari.

Tina Jacobsen úr Mjølnir snikti seg inn millum tær báðar, og tað er eitt herðaklapp til ein góðan leikara.

Hjá monnum stóð kappingin millum teir somu tríggjar leikararnar, sum gjørdust ársins leikarar. Hesaferð var tað Boban Ilic úr ÍF, sum fór avstað við steypinum, og tað valið var í lagið. Samanborið við tvíburðabróðurin, Borco, hevur Boban verið tann støðugari og tað hava leikararnir eisini sannað.

Rúni smeig sær inn millum teir báðar og eisini tað er í lagið. Samanumtikið má tí sigast, at valið av ársins áleypara var eitt gott val.

# Virgar og Jan ársins venjarar

**Leikararnir í flogbóltskappingini hava givið tveimum, sum tóku yvir, tá onnur góvust heiðurin sum besti venjari í ár**

*Sveinur Tróndarson*

Bæði TB og Fleyr løgdu nógv fyri, áðrenn farið varð undir kappingarárið 2001/2002. Bæði feløgini fingu sær útlendskan venjara, men felags fyri tey var, at hvørgin teirra helt í meira enn ein góðan mánað inn í landskappingina.

Tá jugoslaviski venjarin hjá Fleyr varð sendur av landinum og tá italski venjarin hjá TB fór sama veg, heittu feløgini á Jan Hentze og Virgar Djurhuus um at taka yvir, og tað gjørdu teir so væl, at teir nú eru kosnir at vera ársins venjarar.

Hjá kvinnunum er heiðurin uttan iva tengdur at, at tað á fyrsta sinni eydnaðist TB at gerast Føroyameistari og steypakappingina. Virgar tók við eini truplari uppgávu, tí tá venjarin fór avgjørdi rumenski leikarin hjá TB, Lily Popescu at stinga í sekkin og fara sama veg sum venjarin.

Sjálvsagt var hetta dyggur smeitur fyri TB, men fyri tað eydnaðist at halda so væl saman upp á hópin, at liðið stóð sum greipuvinnari tá árið var farið aftur um.

Tá hugsað verður um, at liðið nærum ongantíð venur saman er avrikið hjá tvørámonnum so mikið størri, og uppgávan hjá Virgari so mikið truplari. Hann loysti hana til toppkarakter og nú hevur hann fingið heiðurin fyri tað.

Á teimum næstu plássunum komu Marjun Kalsø úr Mjølnir, Boban Ilic úr ÍF og Herman Lindberg úr Fleyr.

At Jan Hentze var kosin besti venjari hjá monnum, kann heldur ikki koma óvart á nakran. Tá hann tók við uppgávuni lá Fleyr næstniðast og tá árið var liðugt, lógu teir næstovast. Í veruleikanum var tað bara svart óhepni sum gjørdi, at teir ikki endaðu ovast.

Uppgávan hjá Jan var ikki løtt tí hópurin hjá Fleyr hevur verið smalur í ár. Gamaní høvdu leikararnir drúgvar royndir, men tað var ein trupul uppgáva at spæla liðið saman til eina góða eind. Tað eydnðist kortini, og var tað ikki tí, at Steinar Eirikstoft fór av landinum beint áðrenn kappingarenda, hevði tað kanska eydnast teimum at vinna meistaraheitið.

Henda spurning fáa vit tó ikki svaraðan, tí veruleikin er, at Fram gjørdist meistari og fyri tað endaði Romica Øster á triðja plássi. Nummar tvey gjørdist Boban Ilic úr ÍF.

# Anna og Rúni vóru best hetta kappingarárið

**Leygarkvøldið skipaði Flogbóltssamband Føroya fyri gallaveitslu á Hotel Føroyum og í tí sambandi vóru bestu leikararnir seinasta kappingarár kosnir. Næstan øll liðini fingu okkurt heimaftur við, men tað vóru Anna Müller Jacobsen og Rúni Weihe, sum fegnaðust mest. Tey vórðu nevniliga kosin ársins leikararnir**

FLOGBÓLTUR, GALLAVEITSLA

*Sveinur Tróndarson*



*Av øllum teimum, sum í fjør kappaðust í flogbóltskappingini, vórðu Anna Jacobsen og Rúni Weihe kosin sum tey bestu*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nú er flogbóltskappingarárið 2001/2002 liðugt og farið.

Hetta varð staðfest, tá knappliga 200 flogbóltsleikarar, sponsorar teirra og umboð fyri miðlarnar hildu veitslu á Hotel Føroyum leygarkvøldið. Gallaveitslan, sum á fyrsta sinni varð hildin í fjør, var stórfingin og sigast má, at allir partar høvdu gjørt sítt til at kvøldið gjørdist stak hugnaligt.

Høvuðshendingin á Gallaveitsluni var, tá ársins bestu leikarar og venjarar vóru kosnir, og nú allir heiðrarnir eru komnir upp á pláss, kunnu vit staðfesta, at næstan øll liðini fingu okkurt heim aftur við. Í roynd og veru var tað bara kvinnuliðið hjá ÍF – av øllum meistaradeildarliðunum – sum ongan ársins leikara fekk.

Tá tikið verður saman um tilnevningarnar mugu vit eisini staðfesta, at allar tilnevningarnar kunnu verjast á ein ella annan hátt. Eingin av teimum leikarunum, sum eru valdir detta burtur ímillum, og tað er gott.

Men tað skuldi nú eisini verið løgið um tað ikki kundi góðtakast, tí tað eru leikararnir sjálvir sum hava givið heiðrarnar, og tá saman um kemur, eru tað teir, sum best eru førir fyri at meta um dygdirnar. At okkara uppfatan er eitt sindur øðrvísi í ávísum førum, kunnu vit saktans liva við.

## Anna var bilsin

Hjá kvinnunum fall valið á Onnu Müller Jacobsen úr Mjølnir.

Í fyrsta umfari kann hetta kanska tykjast sum eitt løgið val, tí Anna ikki er ein leikari, sum ein vanliga hoyrir nógv til, men tá tað er sagt, mugu vit eisini staðfesta, at hon júst í ár hevur havt eitt gott ár.

Fyrst var hon við á Oyggjaleikalandsliðnum, sum vann Føroyum gullmerkið, og her lá hennara innsatsur ikki eftir. Hon var eisini partur av Mjølnir liðnum, sum í ár gjørdist nummar tvey í landskappingini og í steypakappingini, og eisini har hevur hon víst evnir at ganga undan tá tað kemur til at stríðast og kempa fyri sigrinum, sjálvt tá tap hevur verið í hendi.

Samanumtikið má tí sigast, at heiðurin hjá Onnu var uppiborin.

Einki er at ivast í, at onkur annar hevði valt onkran annan, men valið hjá leikarunum fall á Onnu, og tað er stuttligt at síggja, at leikararnir hava valt ein leikara, sum umframt at vera íðin á vølli samstundis er sera fyrikomandi.

Næstu leikararnir í kappingini hjá kvinnum vóru Helen á Lakjuni, úr ÍF, Gudrid Nolsø, úr TB og Svanna Nielsen úr TB

## Rúni enn einaferð

Hjá monnunum fall valið á Rúna Weihe úr Fram. Hetta valið var kanska meira í tráð við vanligu uppfatanina av tí sum kallast besti flogbóltsleikari, tí Rúni er – beint tvørturímóti Onnu – ein sera eksplosivur leikari.

Sjálvt um tað kanska kom eitt sindur óvart á, at Rúni og Fram gjørdust Føroyameistarar í ár, kom tað ikki so óvart á, at hann gjørdist ársins leikari í Føroyum í ár. Samanumtikið er hann uttan iva besti føroyski leikarin í kappingini, og tað sæst millum annað við, at hann er berandi leikarin á FM-liðnum hjá Fram.

Tað er hann eisini á landsliðnum og tá Oyggjaleikirnir vóru á Man seinasta summar, var Rúni kosin besti servarin í kappingini. So tað eru ikki bara føroysku leikararnir, sum halda, at hann hevur góð evnir.

Hjá Rúna var heiðurin ein endurtøka frá í fjør, og líka so fult uppiborin sum heiðurin hjá Onnu Müller Jacobsen var tað, hevði Rúni eisini heiðurin fult uppibornan.

Næstu leikararnir í kappingini um ársins leikara vóru tvíburðarnir Boban Ilic, úr ÍF, og Borco Ilic, úr SÍ.

# Klaksvíkin hevur stinnasta blokkin

**Trygvi H. Poulsen og Tina Jacobsen vóru kosin bestu blokkleikarar hetta kappingarárið**

*Sveinur Tróndarson*

Hjá kvinnum er einki at ivast í, at kappingin millum blokkleikararnar var hørð. Gamaní hevur Tina verið ein dyggur stuðul á Mjølnir liðnum, men tað hevur Helen á Lakjuni so sanniliga eisini verið hjá ÍF og Svanna Nielsen hjá TB.

Tina Jacobsen var, umframt at vera partur av silvurliðnum hjá Mjølnir, eisini partur av gylta kvinnuliðnum á Man, og hon hevur í ár staðfest seg sum ein av týdningarmiklastu leikarunum hjá Mjølnir. Liðið byrjaði landskappingina uttan hana og tá sást týðuliga, hvussu stórur saknurin í henni var. Tá hon kom aftur á liðið vendi, og tí er valið av Tinu sum besti blokkleikari í lagi.

Ikki tí, bæði Helen á Lakjuni og Svanna Nielsen hava havt góð ár. Helen hevur víst seg at vera serstakliga drúgv. Hon er skjót og kann gera um seg bæði í álopi og í verju. Svanna haraftur ímóti er kanska ikki so skjót sum hinar, men er kortini ein knáur spælari.

Hjá monnum varð Trygvi kosin besti blokkleikari. Einki er at ivast í, at Trygvi hevur verið serstakliga drúgvur á miðjuni hjá Mjølnir, og hann hevur eisini gott eyga fyri blokkinum.

Kappingarneytarnir hjá Trygva vóru enn einaferð Boban og Borco Ilic, og hesaferð hildu leikararnir at Borco átti munin á bróðrinum.

# SÍ og Fleyr áttu framtíðina



*Joen Petur á Stongum úr SÍ og Gudrid Syderbø úr Fleyr vóru kosin ársins stjørnuskot*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Joen Petur á Stongum úr SÍ og Gudrid Syderbø úr Fleyr vóru kosin ársins stjørnuskot 2001/2002**

*Sveinur Tróndarson*

Tað var sera stuttligt at síggja, at Joen Petur á Stongum vann heiðurin, sum ársins stjørnuskot hjá monnum í ár. Sjálvt um hann er ungur, hevur hann víst fram úr góð evni á vøllinum, og tað hava hinir leikararnir eisini lagt til merkis.

Beint undan steypafinaluni í ár fekk Føroya fólka at vita frá hesum unga manni, at hann ikki hevði nervar til finaluna, men at hann var meira bangin fyri at renna inn í høllina, og tað sigur eitt sindur um, hvussu lítið hann er ávirkaður av hóvastákinum.

Eingin kundi seta ein fingur á hansara spæl í finaluni og hansara partur í sigrinum lá ikki eftir. Soleiðis hevur eisini verið í landskappingini og sjálvt um hann eisini hevur havt minni góðar dystir, er einki at ivast í, at hetta valið var rætt.

Heiðrikur Bergson úr Fram gjørdist nummar tvey og Dánjal Vang úr ÍF nummar trý í kappingini, og í báðum førum var talan um spennandi leikarar. Heiðrikur er enntá komin so langt, at hann er við á landsliðnum, so hann fara vit helst at hoyra meira til.

Hjá kvinnum fall valið á Gudrid Syderbø úr Fleyr. Eisini hetta valið er í lagið, tí Gudrid hevur víst seg sum ein knassi í ár. Fleyr hevði tað trupult, men nú avrikini skuldu vigast, mintust leikararnir til hennara avrik og tað má vera eitt gott herðaklapp at hava við sær víðari.

Annars er vert at leggja merki til, at Vágoyggin eigur fýra leikarar millum teir átta, sum vóru nomineraðir til ársins stjørnuskot. Ein hjá monnum og tríggir hjá kvinnum hava sín uppruna í flogbólti í Vágunum og tað má vera eitt tekin um, at tey gera okkurt rætt.

# Romica og Marjun hevaðu best



*Romica Øster varð kosin sum besti hevarin hjá monnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Ein Føroyameistari og ein silvurvinnari vórðu kosnir bestu hevararnir í kappingini**

*Sveinur Tróndarson*

At valið fall á Marjuna Kalsø, kom helst ikki óvart á nakran. Marjun er gomul í garði, og sjálvt um hon ikki er nakar ársungi longur, hevur hon ferð eftir ferð víst, at tað framvegis er dugur í henni.

Umframt at vera góður hevari, er Marjun innpískarin á Mjølnir liðnum, sum í ár gjørdist ov stutt til at vinna meistaraheitið. Hinvegin vann Marjun gull á Oyggjaleikunum og eisini ta ferðina var hon fyrsti hevari á liðnum.

Samanumtikið eitt gott val.

Á øðrum plássi kom ein nýggjari leikari. Anne Mia Johansen frá Føroyameistarunum av Tvøroyri gjørdist nummar tvey meðan Rúna Hentze gjørdist nummar trý.

Hjá monnum varð Romica Øster kosin besti hevari hetta kappingarárið. Her hevur helst verið rættiliga tætt, tí teir báðir kappingarneytarnir hjá Romica – Klæmint Isaksen og Kaj á Stongum – hava til tíðir spælt sera væl í ár, men tá hugsað verður um, at Fram gjørdist Føroyameistari, kann valið forsvarast.

Romica er góður leikari, men okkara fatan er, at hann hevur verið rættiliga svingandi í ár. Avgerandi hevur helst verið, at hann gjørdist Føroyameistari við Fram og tað er í lagi.